Álit

í

løgtingsmáli nr. 58/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunustýri (Kommunustýrislógin) (Broyting av skuldarmarki)

Ruth Vang, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur lagt málið fram 7. mars 2023, og eftir 1. viðgerð tann 15. mars 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20. apríl 2023.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Kommunufelagið og landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Í eftirmetingini av, at eldraøkið varð lagt út til kommunurnar (frágreiðing frá arbeiðsbólki, desember 2021), verður mælt til at broyta skuldarmarkið hjá kommununum, so skuldarmarkið verður hækkað við teimum flytingunum, sum fara frá landi til kommunur. Hetta hevur Fíggjarmálaráðið lagt uppskot fyri Løgtingið um at fremja í verki.

Tað hevur við sær, at umframt samlaðu persónsskattainntøkurnar eftir grundarlagnum, sum verður ásett í kunngerð, verða allar flytingar frá landinum lagdar afturat skuldarmarkinum, áðrenn loyvi krevst frá landsstýrisfólkinum til lántøku og broytingar í lánitreytum.

Nevndin tekur undir við hesum broytingum, og vísir á, at tað ikki bert verða verandi flytingar frá landinum, heruppií eftirlønarskattur og endurgjald fyri DIS, FAS og aðrar frádráttir, men eisini møguligar nýggjar flytingar frá landi til kommunur. Eitt aktuelt dømi kann gerast flytingar frá landinum í samband við tilfeingisgjøld. Kommunali parturin av partafelagsskattinum verður framvegis ikki partur av grundarlagnum.

Nevndin staðfestir, at útrokningargrundarlagið fyri einari álíkning síðan 2003 áhaldandi hevur verið ein kommunuskattur upp á 23 %, og metir ikki, at broytingin í skuldarmarkinum gevur orsøk til at broyta hetta. Í viðgerðini av málinum er ikki nakað komið fram, sum leggur upp til, at grundarlagið á 23 % eigur at verða broytt nú av øðrum orsøkum, men heldur ikki nakað, sum hevur við sær, at nevndin metir orsøk vera at broyta skipanina, har landsstýrisfólkið hevur heimild at broyta grundarlagið.
Nevndin metir, at hóast hetta uppskotið ikki hevur við sær, at kommunali geirin fær eitt størri fíggjarligt grundarlag til at fíggja eldraøkið, so hevur økta skuldarmarkið við sær, at frælsið og møguleikin hjá kommununum at leggja soleiðis til rættis, at millum annað íløgur í eldraøkið í størri mun kunnu fremjast.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 28. apríl 2023

Eyðgunn Samuelsen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Hanna Jensen
Eirikur í Jákupsstovu	Bjarni Hammer	Steffan Klein Poulsen
	Magnus Rasmussen	